# Buzz Aldrin á føroyskum



Bæði í bókini og í filminum eru nógvar lýsingar av býarlívinum í Havn, millum annað á Café Natúr




Bókin »Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet?« er týdd til fleiri enn 10 mál og er vorðin metsølubók. Nú er hon eisini komin á føroyskum

*Í bókini endar søgan um unga, norska gartnaran í Føroyum eisini í Sosialinum. Her er tað Mattias í filminum, sum lesur greinina um seg sjálvan*




**Bókin handan sjónvarpsrøðina Buzz Aldrin er nú komin í føroyskari týðing**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*»... mundu Føroyar vera fyrsta barnaheimsbarnið – goymt burtur í útjaðaranum – eitt land, tú næstan ongantíð hugsar um, fyrr enn tú knappliga ein dagin lesur eina stutta grein um tað og hugsar, har vart tú – hvar hevur tú verið alt mítt lív.«*

Úr skaldsøguni *Buzz Aldrin hvar bleivst tú av í ruðuleikanum?*

Skaldsøgan *Buzz Aldrin, hvar bleivst tú av í ruðuleikanum?* er nú komin út á føroyskum. Sama bók er eisini grundarlag undir norsku sjónvarpsrøðini *Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet?*, sum hevur verið tikin upp í Føroyum í summar.

### Hin ævigi 2'arin

Tað er norski høvundurin Johan Harstad, ið hevur skrivað søguna um unga gartnaran Mattias, sum er sera hugtikin av astronautinum Buzz Aldrin, sum var annar maður uppi á mánanum. Eins og Buzz Aldrin vil Mattias vera nummar tvey - hann vil vera ókendur.

Eftir tíggju ár fer daman frá honum. Árið er 1999, ein nýggj øld er byrjað, Mattias er 30 ár. Tá ein vinur hansara bjóðar honum til Føroya at hjálpa orkestrinum á eini konsertferð, tekur hann av.

Í bókini eru hópin av frálíkum lýsingum av føroyska landslagnum og bygdarlívi, har Mattias millum annað verður góður vinmaður við ein smádrong úr Gjógv.

Men hetta verður eisni eitt tíðarskeið, tá alt av álvara skramblar saman fyri Mattias. Ferðin til Føroya gerst ein langur roadmovie um hansara knústa hjarta og sinn, ein søga um at missa seg sjálvan burtur í ruðuleikanum, um rúmdina og Buzz Aldrin, Gjógv og Café Natúr, um svenskan popptónleik úr nítiárunum og um Føroyar meinlíkt einum mánalandslagi. Men eisini um at minnast alt tað, sum er hent seinastu árini, tí hvussu finna vit nakra meining við tilveruni, tá alt rapar?

Johan Harstad fekk altjóða gjøgnumbrot við skaldsøguni *Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet?* Bókin er nú týdd til fleiri enn 10 mál og er vorðin metsølubók.

### Kanska í Kringvarpið

Frá framleiðaranum av sjónvarpsrøðini, Yngve Sæther, frættist, at tey júst eru liðug at gera seinastu upptøkurnar í Føroyum og eru nú farin undir at klippa røðina. Væntast kann, at NRK fer at vísa røðina antin á heysti 2010 ellá á vári 2011. Enn er ikki greitt, um Kringvarp Føroya eisini fer at vísa røðina. Millum leikararnar hevur til dømis Anfinnur Heinesen ein týðandi leiklut, og somuleiðis er kendi danski sjónleikarin Bjarne Henriksen við.

Tað er forlagið Eksil, ið gevur bókina út, og Agnar Artúvertin hevur týtt til føroyskt.

**Kunningarstovan og miðbýurin í Havn** www.kunning.fo




| | | |
|---|---|---|
| 18. des | kl. 17.00 | Musikkskúlalærarar blása jólini inn í gonguøtuni |
| | kl. 18.00 | Musikkskúlalærarar blása jólini inn í Dr. Jakobsens øtu |
| 19. des | kl. 15.00 | Jólaskipið kemur í Vágsbotn við jólamonnum. GHM spælir jólaløg, meðan bíðað verður eftir jólaskipinum |
| | kl. 17.00 | GHM spælir í Dr. Jakobsens øtu |
| | kl. 18.00 | Kórið Glymur syngur í gonguøtuni |
| 20. des | kl. 15.00 | 2 jólamenn koma til Havnar. Rossini bíða við Skansan og haðani fara teir niðan í býin á rossabaki |
| | kl. 16.30 | Kórið KASSIA syngur á trappuni hjá Ebenezer |
| | kl. 17.00 | Tórshavnar Ungdómshornorkestur spælir í gonguøtuni |
| | kl. 18.00 | Tórshavnar Kamarkór syngur runt um í býnum |
| 21. des | kl. 16.30 | Jólamaðurin lesur søgur í jólahugnastovuni í gonguøtuni |
| | kl. 17.00 | Tórshavnar Ungdómshornorkestur spælir í Dr. Jakobsens øtu |
| | kl. 18.00 | Kristiliga Sangkórið syngur í gonguøtuni |
| | kl. 19.00 | Havnar Hornorkestur spælir í gonguøtuni |
| 22. des | kl. 16.00 | Argjakórið, gentukór av Argjum syngur í gonguøtuni |
| | kl. 16.00 | Kórið Cantabile syngur runt um í býnum |
| | kl. 16.30 | Jólamaðurin lesur søgur í jólahugnastovuni í gonguøtuni |
| | kl. 19.00 | Kórið hjá Frelsunarherinum syngur í gonguøtuni |
| 23. des | kl. 16.30 | Jólamaðurin lesur søgur í jólahugnastovuni í gonguøtuni |
| | kl. 18.00 | Kórið Glymur syngur runt um í býnum |
| | kl. 19.00 | Havnar Hornorkestur spælir í Dr. jakobsens øtu |

Sí eisini heimasíðurnar hjá Tórshavnar kommunu: www.torshavn.fo og hjá Kunningarstovuni: www.visittorshavn.fo og www.kunning.fo